# Ónøgdin er so stór at vit mugu kanna málið

**Bill Justinussen roynir nú at finna útav, hvat kann gerast fyri at loysa trupulleikarnar á føroyska sjúklingahotellinum Tórshavn í Keypmannahavn**

HOTEL TÓRSHAVN
*Áki Bertholdsen*


*Bill Justinussen fer nú sat vita, um tað ikki ber til at gera umstøðurnar á føroyska sjúklingahotellinum í Keypmannahavn, betri, men hann ásannar, at fíggjarligu møguleikarnir eru avmarkaðir*

Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum, er nú farin at kanna eftir, hvussu umstøðurnar hjá teimum føroysku sjúklingunum, sum verða sendir til Keypmannahavnar, kunnu gerast betri.

Seinastu tíðina hevur eitt sindur verið frammi um, hvussu vánaligar umstøðurnar á føroyska sjúklingahotellinum Tórshavn í Keypmannahavn eru.

Bill Justinussen sigur, at síðani hetta var frammi í Sosialinum og øðrum fjølmiðlum herfyri, hevur hann fingið hann frætt frá heilt nógvum fólki, sum eisini hava givið ilt av sær um umstøðurnar á hotellinum.

– Eitt nú er, at legionella bakterian er staðfest í vatninum og tað hevur ført við sær, at sjúklingar við veikari immunverju ikki eru sloppin í bað. Men aðrir trupulleikar hava eisini verið, eitt nú hevur ventilatiónin ikki virkað, svampur eru í onkrum verilsum, onki fríøki er rundanum, og hotellið er so lítið, at onkuntíð er reitt upp til fólk á baðiverilsum, ella at verilsi eru leigað á øðrum hotellum. Somuleiðis skuldi garðurin gerast til fríøki, men tað er ikki hent enn.

– At rúm ikki skal vera fyri øllum á Hotel Tórshavn, er ikki nøktandi, tí starvsfólkið har eru sjúkrasystrar og skulu fólk gista aðrastaðni, er ein partur av endamálinum burturdottin.

Bill Justinussen sigur, at tey allarflestu, hann hevur frætt frá, kæra seg um, hvussu vánaligar umstøðurnar eru. Og ganga vit útfrá, at tað bara er toppurin á ísfallinum, sum vit frætta um, mugu vit ásanna, at umstøðurnar eru alt annað enn nøktandi, sigur Bill Justinussen.

– Og tá ið ónøgdin er so stór, sum hon er, mugu vit kanna málið fyri at vita, hvat vit kunnu gera, leggur hann afturat.

### Kanna ymsar møguleikar

Bill Justinussen sigur, at fleiri møguleikar eru.

Fólk út umsitingini í Trivnaðarmálaráðnum kanna umstøðurnar. Eitt nú skal hotellið, sum grønlendingar hava og tey skulu eisini tosa við felagið, sum eigur húsið, sum Hotel Tórshavn er í, fyri at vita, um tað ikki ber til at gera umstøðurnar betri.

Samstundis eru tey í Trivnaðarmálaráðnum farin at kanna eftir, sum sásttmálin um leigumálið er hildin, ella um hann brotin so illa, at tað ber til at siga hann upp og at sleppa burturúr leigimálinum.

Sostatt verður arbeitt við fleiri møguleikum, bæði møguleikanum at gera umstøðurnar á hotellinum betri. Men kannað verður eisini, um tað ber til at leiga ein størri part av húsinum fyri at gera hotellið størri, og somuleiðis verður møguleikin kannaður at siga leigusáttmálan upp og at leiga eini heilt onnur høli, ella at keypa eini høli. Enn veit hann ikki, hvat endin verður.

Men hann ásannar eisini, at hetta er ein peningaligur spurningur, tí landsstýrið hevur hámark fyri, hvussu nógvur peningur kann brúkast, fyri ikki at missa tamarhaldið á búskapinum, so at vit enda aftur í kreppu og sostatt eru fíggjarligu karmarnir avmarkaðir.

Bill Justinussen sigur eisini, at arbeitt verður somuleiðis við at fáa fleiri viðgerðir á Landssjúkrahúsið, sum nú fáast á Ríkissjúkrahúsinum, eins og spurningurin um at senda sjúklingar til onnur lond, enn til Danmarkar, eisini verður viðgjørdur og spurningurin um Hotel Tórshavn skal eisini síggjast í tí ljósinum.

– Spurningurin er, hvussu fast vit skulu læsa okkum í Hotel Tórshavn, tí enn vita vit ikki, hvussu nógvir sjúklingar fara at verða sendir til Keypmannahavnar í framtíðini. ( Sí eisini greinina niðanfyri).

# Føroyskir sjúklingar skulu hava fleiri tilboð um viðgerð

**Bill Justinussen fer nú kanna, um tað ber til at senda føroyskar sjúklingar aðrastaðni enn til Danmarkar. Møguleikin at flyta fleiri viðgerðir heim á Landssjúkrahúsið, verður eisini kannaður**

SJÚKUVIÐGERÐ
*Áki Bertholdsen*



*Ætlaniner nú at vita, um tað ber til at senda føroyskar sjúklingar aðrastaðni, enn til Danmarkar og somuleiðis verður kannað, um tað ber til at fáa útlendskar serlæknar hendavegin í størri mun enn nú, so at vit framyvir sleppa undan at senda so nógv sjúklingar av landinum*

Føroyskir sjúklingar, sum hava brúk fyri serviðgerð uttanlands, skulu nú hava fleiri møguleikar, enn at verða sendir til Danmarkar. Tað heldur Bill Justinsusen, landsstýrismaður í heilsumálum.

Hann sigur, at hann fer at kanna eftir, um tað ikki ber til at flyta onkrar viðgerðir heim á Landssjúkrahúsið, sum føroyingar nú fáa uttanlands.

Somuleiðis fer hann at kanna eftir, um tað ikki ber til at senda føroyingar aðrastaðni, enn til Danmarkar at fáa viðgerð.

Sostatt ætlar hann at taka táttin uppaftur, sum undanmaður hansara í Landsstýrinum, Helena Dam á Neystabø, hevði sett sær fyri at kanna, men sum hon ikki kom nakran serliga langan veg við, tá ið hon legði frá sær.

– Tá bleiv tað ongantíð til meiri enn tankar og ætlanir. Men eg ætli ikki at leggjast á boðini, sigur Bill Justinussen.

Hann sigur, at eitt nú ætlar hann at finna útav, hvat íslendingar, sviar, norðmenn, og kanska eisini skotar, hava at bjóða av viðgerð á teirra sjúkrahúsum.

– Í løtuni tykist tað sum um danir hava fingið eitt slag av einkarrætti upp á at viðgera føroyingar og tað haldi eg ikki er rætt og tí fara vit at kanna aðrar møguleikar.

Hann hugsar bæði um at skipa so fyri, at føroyingar verða sendir hagar at fáa viðgerðir, men hann hugsar eisini um at fáa serlæknar hendavegin at viðgerða føroyingar á Landssjúkrahúsinum við ymsum millumbilum.

– Ístaðin fyri at senda fleiri sjúklingar av landinum, kann tað verða ein betri loysnt at fáa ein serfrøðing hendavegin at viðgera teir, tí tað er uttan iva betri fyri sjúklingin, at vera heima.

Hann sigur, at hann hugsar ikki um ávísar viðgerðir, men at ætlar at kanna, hvat tey ymsu sjúkrahúsini í grannalondum okkara runt íkring, hava at bjóða av serfrøði.

Hann væntar, at fyrsta stigið verður, at læknaserkunnleikin í Føroyum, fer at finna útav, hvat tey ymsu londini hava at bjóða og hann sigur, at farið verður í holt við arbeiðið, so skjótt arbeiðsorka er í Trivnaðarmálaráðnum til tað.

Hann sigur, at spurningurin um umstøðurnar hjá føroyskum sjúklingum í Keypmannahavn, skulu eisini síggjast í ljósinum á hesum (sí greinina omanfyri).



# Væleydnað barnaprix í Norðoyggjum

**Leygarkvøldið var 4. innleiðandi umfarið í Nósabarnaprix. Kappingin var í KÍ-høllini í Klaksvík**

NÓSABARNAPRIX
*Rúna Sivertsen*

Við í kappingini leygarkvøldið vóru 8 gentur og 1 drongur, men hóast genturnar vóru so nógv við yvirlutan, var tað drongurin, 12 ára gamli Olvheðin Jacobsen úr Hvannasundi, ið fór avstað við sigrinum.

Á øðrum plássi kom Maria Nolsøe úr Havn, og nr. 3 gjørdist Mathilda Sivertsen úr Hoyvík.

Undirtøkan í Norðoyggjum var ikki stór hesuferð, tí sluppu luttakarar úr øðrum pørtum av landinum við til hesa kapping.


*Babyjames fekk bæði vaksin og børn at flenna í kíki. James Olsen og Angela Petersen, gjørdu kvøldið til eina stuttliga uppliving fyri bæði vaksin og smá*

*(Mynd Rúna Sivertsen)*

James sigur, at áhugin annars er stórur at verða við í Nósabarnaprix. Um 300 børn sluppu ikki við á hesum sinni, sigur hann.

Sum altíð, var ógvuliga torført at døma, siga dómararnir. Luttakararnir lógu sera tætt.

– Millum børnini hesuferð, eru avgjørt »talentir« at finna, sigur James Olsen, sum saman við Mark Joensen hevur tikið stig til barnaprix í Føroyum.

James sigur, at endamálið við kappingunum er at geva børnum møguleika at koma sær fram, hava tey gávur at syngja og framføra.

– Sjálvur fekk eg mítt »gjøgnumbrot«, tá eg sum 11 ára gamal vann eina sangkapping í SMS í 1981, sigur James Olsen.

James sigur, at síðani tá hava ongar sangkappingar verið fyri børn.

### Eitt sindur fyri øll

Kappingin leygarkvøldið var væleydnað. James Olsen og Angela Petersen undirhildu, og tað komu tey serstakliga væl frá.

Tey fingu ikki bara børnini at flenna, men eisini tey vaksnu fingu sær ein góðan látur hetta kvøldið.

– Vit royna at gera eitt sindur fyri øll, so tað ikki verður keðiligt, sigur James.

Nú eru 3 undankappingar eftir; í Havn 5. okt., á Oyrabakka 12. okt. og í Vágunum, 19. oktobur.

Finalan verður á Kambsdali 9. novembur.

Tað er Føroya Banki, ið er høvuðsstuðul fyri hesum tiltaki, sum hevur fingið heitið; Nósabarnaprix.

– Vit eru væl nøgd við kappingarnar, sum hava eydnast væl, og verður hetta eitt afturvendandi tiltak hvørt ár framyvir, sigur James Olsen at enda.

# Nýggj stjørna úr Hvannasundi


*Olvheðin Jacobsen úr Hvannasundi, vann innleigandi umfarið í barna Grand Prix í KÍ-høllini leygarkvøldið. Við kenslubornu og reinu rødd síni, sang hann seg inn í hjørtuni á áhoyrararnum*

**Við sanginum, »Eingin er sum tú«, sang 12 ára gamli Olvheðin Jacobsen úr Hvannasundi seg inn í hjørtuni á áhoyrarunum í KÍ-høllini leygarkvøldið. Olvheðin vann innleiðandi kappingina í Nósabarnaprix í Norðoyggjum**

NÓSABARNAPRIX
*Rúna Sivertsen*

»Eingin er sum tú, eingin annar rørir hjartað sum tú.« Kensluborið og stillisliga sang Olvheðin seg til ein tryggan sigur.

Hóast sín unga aldur, hevur Olvheðin gott tamarhald á røddini. Framførsla hansara var sannførandi, og lítið er at ivast í, at hesin ungi drongur kann koma langt, ger hann sær ómak.

Í stuttum práti við Sosialin, sigur Olvheðin:

– Eg hoyrdi um kappingina í juni mánaða, og í juli teknaði eg meg til.

Spurdur, hvør hevur vant hann, og um hann vanliga syngur nógv, sigur Olvheðin:

– Mamma hevur hjálpt mær og sagt mær, hvar eg skal anda, men eg havi bara vant heima. Systir mín hevur eisini hjálpt mær, sigur hann.

– Eg syngi í samkomuni, Soli Deo Gloria, har vit ganga. Har syngi eg eisini fyri við hvørt, og onkuntíð havi eg sungið solo, sigur Olvheðin.

Olvheðin sigur, at hann fegin vil sleppa at geva eina fløgu út, men tað er nokso dýrt, heldur hann.

Til framførsluna leygarkvøldið, stóð Olvheðin einsamallur á pallinum, uttan dansarar, sum alt vanligari er.

– Eg helt tað ikki vera neyðugt at hava dansarar. »Eingin er sum tú«, er ein stillur sangur. Eisini er ringt at finna dansarar á mínum aldri, segði ungi hvannasundsdrongurin at enda.

### Miðvísur drongur

Mamma Olvheðin, Marianna Jacobsen, sigur við Sosialin, at Olvheðin er ein serstakliga miðvísur drongur.

– Setir hann sær nakað fyri, so gjøgnumførir hann tað eisini, sigur hon.

Marianna sigur, at Olvheðin ikki er komin spælandi til sigurin.

– Hann hevur sungið og vant so at siga út í eitt, síðani hann hoyrdi um kappingina. Vit eru nærum ikki sloppin inn í kamarið til hansara, sigur hon.

– Frammanundan kappingini, hevði eg ikki væntað, at Olvheðin fór at vinna. Men tá hann kom á pallin, gjørdist eg púra ovfarin og roknaði tá við, at hann hevði góðan møguleika at gerast bestur, sigur Marianna.

Marianna sigur, at Olvheðin hevði ætlað at sungið ein sang hjá Branduri Enni, men 10 dagar áðrenn kappingina, gjørdi hann av heldur at syngja; »Eingin er sum tú«.

Luttakararnir á Nósabarnaprix 2002 í Norðoyggjum vóru 9 í tali; 8 gentur og Olvheðin, sum var einsamallur drongur, ið luttók á hesum sinni.

